UTTAN UR HEIMI

# Hungur hóttir 40 milliónir fólk í Afrika

**Vandi er fyri, at 40 milliónir afrikanarar fara at líða hungur í ár, fáa tey ikki hjálp frá altjóða samfelagnum. Men altjóða samfelagið hevur ikki sama ans fyri neyð í Afrika sum aðrastaðni.**

HUNGURSNEYÐ

*Árni Joensen:*

- Hvussu ber tað til, at altjóða samfelagið er til reiðar at góðtaka neyð og líðingar í Afrika, sum vit ikki høvdu góðtikið, var tað nakra aðrastaðni á Jørðini?

Spurningin eigur leiðarin fyri heimsins matvøru-stovni WFP, James Morris, sum skýrir hetta dupultmoral, ið ikki kann halda fram.

Oman á støðuna í Afrika kemur Irak, har stórur tørvur er á hjálp aftan á kríggið og tólv ár við tiltøkum. WFP hevur biðið um at fáa 10 milliardir krónur til at hjálpa irakska fólkinum, men enn hevur stovnurin bert fingið smáar tvær milliardir. Tær eru komnar úr USA, Bretlandi, Avstralia, Týsklandi, Kanada, Spania, Ný Sælandi og Italia.

Samstundis eru tað aðrir, sum fýlast á, at USA nýtir 455 milliardir krónur til kríggið í Irak, meðan landið bert er sinnað at veita irakska fólkinum 3,8 milliardir krónur til neyðhjálp. Tveir heilsuserfrøðingar á lærda háskúlanum í London, Jaime Miranda og David Barr, siga í einari frágreiðing, at heilsa og vælvera hjá fólki er avgerandi fyri trygd og støðug viðurskifti.

- Men kortini leggur amerikanska stjórnin minni dent á hesi grundleggjandi viðurskiftini enn á tað, sum stjórnin rópar bardagan ímóti yvirgangi, siga teir báðir bretsku serfrøðingarnir.

# Uppaftur eitt deyðiligt virus funnið í Vietnam

**Í Vietnam eru minst tíggju børn deyð hendan seinasta mánaðin av einum løgnum virus. Tað er ikki SARS.**

VIRUSSJÚKUR

*Árni Joensen:*

Sambært heilsumyndugleikunum í Vietnam høvdu tey tíggju børnini nógvan fepur, tá tey vórðu løgd inn á barnasjúkrahúsið í Ho Chi Minh. Eftir stuttari tíð fingu tey magapínu, fullu síðani í óvit og fingu trupulleikar við andadráttinum og at enda hjartasteðg.

Tann seinasti tilburðurin var mánadagin, tá eitt sekstan mánaðar gamalt barn doyði ellivu tímar eftir, at tað var komið á sjúkrahúsið.

Teir vietnamesisku læknarnir halda, at tað nýggja virusið er eitt enterovirus, sum ger seg inn á gøgnini og elvir til magapínu, spýggju og lammilsi.

- Vit halda ikki, at hetta er lungnasjúkan SARS. Vit hava eisini kannað, um talan er um nakað virus, sum læknavísindin veit um, men allar hesar kanningarnar hava verið úrslitaleysar, sigur stjórin á sjúkrahúsinum í Ho Chi Minh, Tang Chi Thung.

Hann sigur, at eingin heilivágur vísti seg at hjálpa sjúklingunum, men at teir tvørturímóti doyðu eftir stuttari tíð.

Í 1998 doyðu 50 børn, og 253 onnur gjørdust sjúk av einum enterovirus á Taiwan.

*Í Fjareystri ganga nógv fólk við verndarmasku ímóti SARS. Nú er enn eitt deyðiligt virus farið at gera um seg í Vietnam.*



# Kofi Annan 65

**Ein lágmæltur maður við blíðum, men álvarssomum eygum. Kofi Annan, ST-aðalskrivari, fylgir í hesum døgum gjølla við tí, sum hendir í Irak. Í gjár fylti hann 65.**

FØÐINGARDAGUR

*Árni Joensen:*



Kofi Annan hevur fyrr sagt, at tá viðurskiftini í heiminum eru serliga trupul, plagar hann at ganga langar túrar, tí tá fær hann møguleika og stundir til at hugsa. Einki at ivast í, at hann hevur tørv á fleiri slíkum túrum í hesum døgum, tí hann hevur ikki dult fyri, at hann metir kríggið í Irak sum eitt sera álvarssamt mál fyri alt heimssamfelagið.

Kofi Annan er ættaður úr Ghana. Pápi hansara var høvdingur í einum ættarbólki har. Sjálvur er hann vorðin friðarhøvdingur hjá øllum heiminum. Hann sigst vera ein hóvligur, blíður og klókur maður. Hann tykist varin og afturhaldandi, men eingin skal vera í iva um, at hann veit, hvat hann vil. Tey eru mong, sum halda, at hann er tann besti aðalskrivarin, sum ST hevur havt síðani svian Dag Hammerskjøld, sum doyði í einari flogvanlukku í 1961.

Kofi Annan hevur tvær amerikanskar universitetsútbúgvingar, hann tosar enskt, franskt og fleiri afrikansk mál. Sum aðalskrivari hevur hann staðið fyri fleiri nýskipanum í ST-skipanini. Eitt nú hevur hann tryggjað kvinnunum betri atgongd til størv hjá heimsfelagsskapinum.

Kofi Annan hevði fleiri álitisstørv í ST, áðrenn hann gjørdist aðalskrivari í 1997. Hann hevur verið hákommiserur í flóttafólkamálum, næstovasti fyri teimum friðarvarðveitandi deildunum hjá ST, serligur sendimaður í Irak og Jugoslavia og varaaðslskrivari.

Í hesum døgum liggur kríggið í Irak honum fremst í huganum, og tað er einki at ivast í, at hann fer at gera alt, sum gerast kann, til tess at tryggjua, at heimsfelagsskapurin skal verða við til at tryggja friðin, tá kríggið í Irak einaferð er liðugt.



UTTAN ÚR HEIMI

# Bumbaðu Saddam og synirnar

**Amerikanarar vistu, hvar Saddam Hussein og synir hansara vóru. Stutt eftir raktu fýra sterkar bumbur húsini.**

KRÍGGJ Í IRAK

*Árni Joensen:*

Fyrrakvøldið boðaði fregnartænastan CIA amerikansku herleiðsluni í Qatar frá, at irakski leiðarin Saddam Hussein, og synir hansara, Qusay og Uday, vóru farnir á ein fund í kjallaranum á einari matstovu í Monsur-býarpartinum í Bagdad. CIA visti eisini at siga, at einir 50 limir í Bath-flokkinum hjá Hussein vóru eisini á fundinum.

Herleiðslan í Qatar bar skjótt at, og 40 minuttir seinni slepti eitt B1-bumbuflogfar fýra sterkum bumbum niður yvir bygningin, sum hýsti matstovuni. Bumburnar vigaðu 900 kilo hvør, og spreingirnar vóru so ógvusligar, at bygningurin varð javnaður við jørðina.

Spurningurin í gjár var, um Saddam Hussein veruliga var í húsunum, tá bumburnar fullu. Amerikanarar søgdu seg ikki vita tað við vissu, men hinvegin vóru teir sannførdir um, at var irakski leiðarin har, tá bumburnar raktu húsini, er hann neyvan á lívi longur.

Bretska blaðið The Guardian skrivaði í gjár, at CIA visti ikki einans, at Saddam Hussein og synir hansara vóru í húsunum í Monsur-býarpartinum, men at fregnartænastan visti eisini, hvat teir og Bath-limirnir tosaðu um. CIA lurtaði eftir orðaskiftinum, og sambært The Guardian snúði fundurin seg um, hvussu tað mundi bera til at sleppa til rýmingar úr Bagdad. Hetta vildu amerikansku myndugleikarnir tó ikki vátta í gjár.

# Tað var ikki nervagass

**Tá amerikanskir hermenn funnu tunnur við einum flótandi evni, hildu teir seg hava fingið prógv fyri, at Irak hevur evnafrøðilig hópoyðingarvápn. Men innihaldið í tunnunum vísti seg at vera eitt evni ímóti illgrasi.**

KRÍGGJ Í IRAK

*Árni Joensen:*

- Umfatandi kanningar hava víst, at tað, sum vit funnu sunnan fyri Bagdad, var eitt evni ímóti illgrasi og ikki nervagass, segði Adam Mastrianni, talsmaður hjá amerikansku hermonnunum í Irak í gjár.

Amerikanararnir hildu í fyrstani, at teir vóru komnir fram á eina goymslu við evnafrøðiligum vápnum, og fleiri fjølmiðlar mettu tunnurnar sum prógv fyri, at Irak veruliga hevur hópoyðingarvápn. Hildið varð, at talan var um nervagassið sarin, men kanningar hjá amerikanskum serfrøðingum vístu, at so var ikki.

Arabisk bløð hava seinastu dagarnar gjørt nógv burturúr, at amerikanarar og bretar framvegis ikki hava funnið nøkur hópoyðingarvápn í Irak, og fleiri av bløðunum skriva, at kríggið við Irak hevur sín uppruna í einari lygn.

Fyri nøkrum døgum síðani søgdu amerikanskir talsmenn, at hermenninir høvdu funnið hópoyðingarvápn við býin Najaf, men tað avsannaði bretski verjumálaráðharrin, Geoff Hoon, seinni.

Tá kríggið brast á, fingu amerikansku og bretsku hermenninir serligar trygdarbúnar, sum skuldu verja teir ímóti møguligum evnafrøðiligum ella lívfrøðiligum vápnum. Men amerikanararnir munnu kenna seg tryggar nú, tí mánadagin fingu 20.000 flotahermenn boð um, at teimum nýtist ikki at vera í verndarbúna longur.

- Vit halda ikki, at vandin fyri evnafrøðiligum álopum er serliga stórur, segði talsmaðurin hjá flotahermonnunum.



*Tað var ikki nervagass, men eitt evni ímóti illgrasi, sum var í tunnunum, sum amerikansku hermenninir funnu.*

## Lívlanga arbeiðslegu

Russiska dómsvaldið hevur dømt ein mann lívlanga arbeiðslegu, eftir at maðurin varð funnin sekur í at hava pínt og myrt fimtan fólk seinastu tíggju árini.

Tann 39 ára gamli Alexander Borovkov búði í býnum Jaroslavl, sum er einar 300 kilometrar í landnyrðing úr Moskva. Har gjørdi hann seg inn á fólk, og serliga vóru tað tey, sum áttu stór ella dýr hús, sum liðu undir ágangi hansara. Í 1994 varð hann tikin, men flýddi úr fongslinum.

Meðan hann sat í fongslinum, hevði hann gjørt av at beina fyri teimum, sum hann fyrr hevði gjørt seg inn á, tí á tann hátt kundi hann sleppa undan, at nakar teirra fór at vitna ímóti sær. Úrslitið varð, at hann myrdi fimtan fólk. Undir rættarmálinum ímóti honum kom fram, at nakrir aðrir menn høvdu hjálpt honum. Fýra teirra hava nú fingið millum 22 og 25 ára fongsul.

## Boston Globe heiðrað

Tá amerikansku fjølmiðlarnir í fjør avdúkaðu eina sexgølu fyri og aðra eftir í katólsku kirkjuni í USA, var tað blaðið Boston Globe, sum gekk á odda.

Og nú hevur blaðið fingið samsýning fyri arbeiði sítt. Mánakvøldið varð kunngjørt, at Boston Globe hevur fingið ta virðismettu Pullitzer-heiðurslønina aftur arbeiði sítt at avdúka loynidómarnar aftan fyri amerikansku kirkjudyrnar.

- Tit skrivaðu søgu í fjør. Tit gjørdu, at heimurin er vorðin betri, tryggari og meiri menniskjaligur at búgva í, segði blaðstjórin á Boston Globe, Martin Baron, í einari heilsan til blaðfólkini.

## Drúgvur vetur

Veturin hevur havt óvanliga ilt við at sleppa takinum á Suðurevropa í ár. Vanliga plaga tað at vera umleið 20 hitastig í italska landspartinum Apulia hesa tíðina á árinum, men tá fólk har komu upp mánamorgunin, var avkavað. Longur norðuri, í italsku Alpunum, ávaraðu myndugleikarnir um vanda fyri skalvalopum.

Í Suðurtýsklandi hevur ferðslan verið nógv darvað av kava og hálku teir seinastu dagarnar. Hetta er ikki vanligt, og tí høvdu nógvir bileigarar sett sær summardekk undir bilin. Tá so hálkan kom, endaðu nógvir bilar við síðuna av vegnum, og aðrir stoyttu saman.

Eisini longri norðuri í Týsklandi hevur hálkað órógvað ferðsluna, og løgreglan sigur, at nógv ferðsluóhapp hava verið á motorvegunum við Berlin og Dresden. Í Danmark hevur tað verið kalt seinastu dagarnar, og í gjár boðaðu veðurmenninir har frá kava.

## Skotar jaga tindasvín

Bretsku umhvørvismyndugleikarnir eru farnir undir at jaga tindasvín á oynni North Uist úti fyri skotsku vesturstrondini.

Myndugleikarnir hava gjørt av at taka 200 tindasvín í ár. Trupulleikin er, at tindasvínini gera seg inn á fuglin, sum eigur á oynni. Tindasvínini loeggjast á reiðrini, og tað hevur havt við sær, at fuglurin á North Uist er nógv minkaður. Bretsku umhvørvisverndarfelagsskapirnir siga seg skilja, at tað er neyðugt at bjarga fuglalívinum á oynni, men teir halda tað kortini ikki vera rætt at avlíva tindasvínini. Tí verður roynt at taka tey livandi, so tey møguliga kunnu flytast aðrastaðni, har tey ikki gera fugli opg øðrum ónáðir.

Men tað er ikki vist, at tað verður so lætt at fáa fatur á tindasvínunum. Víst verður á, at veturin hevur verið rættiliga kaldur har á leiðini, og tí verður hildið, at tindasvínini liggja framvegis í dvala. Og tá eru tey ikki løtt at finna.